## Elektron sendir Rás2 avstað

Elektron og Rás2 hava gjørt sponsoravtalu, sum er við til at tryggja fíggjarliga grundarlagið fyri manssterka oyggjaleikaliðnum hjá Miðlahúsinum. 9 fólk fara at umboða miðlarnar hjá Miðlahúsinum á Álandi. Hesi fólk fara at senda á Rás2 allan dagin, skriva tíðindi til Portalin, framleiða sjónvarpsinnsløg til Kykmyndir og skrivar greinar og taka myndir til Sosialin.

- Vit halda, hetta ljóðar sera spennandi, og vit eru ein frísk fyritøka, sum gjarna vil spæla við í hesum, sigur Dánjal Samuelsen, marknaðarsamskipari hjá Elektron




# arðari mótstøðu



## BADMINTON

Nú sleppa føroysku badmintonspælararnir aftur at royna seg á Oyggjaleikum. Eftir hampuliga góð avrik fyri fýra árum síðani, slapp badminton ítróttin als ikki upp í part á Rhodos fyri tveimum árum síðani. Vónir eru um, at onkrir av føroysku badmintonspælarunum kunnu vinna heiðursmerki.

**Hóast Sigrun Smith síðst vann gull á alternativu oyggjaleikunum í badminton, sum vóru í Grønlandi, er hon ikki vís í, at tað verður líka lætt at vinna gull hesa ferð. – Fleiri av teimum sterkastu vóru ikki við tá, so tað verður kanska torførari hesa ferð, heldur hon**




Hilmar Jan Hansen

Lítið man vera at ivast í, at ein av nýggjaru spælarunum á badmintonlandsliðnum er ein, ið kann vera hinum til fyrimynd og íblástur. Tað hevur víst seg í eitt nú FM-kappingunum, og vónin er nú, at tað eisini kann síggjast aftur í tí størra hópinum, eitt nú á Oyggjaleikunum.

Sigrun Smith hevur føroyskan pápa, sum er føddur og uppvaksin í Havn, og her býr eisini øll hansara familja.

– Eg eri komin higar, frá tí at eg var lítil, og eg havi altíð elskað at komið til Føroya, sigur Sigrun.

At hon endaði á føroyska landsliðnum í badminton, komst av einum øðrum, ið hevði ættarbond hendavegin. Tað var Tobias Effersøe, sum hevur verið venjari hjá bæði Havnar Badmintonfelag og Badmintonsambandinum, sum kom í samband við Sigrun, og soleiðis gjørdist tað til, at hon kom á føroyska badmintonlandsliðið.

### Skal verja gull

Tá Oyggjaleikirnir vóru á Rhodos fyri tveimum árum síðani, var badminton ikki við, men nøkur av oyggjasamfeløgunum funnu upp á ráð og høvdu alternativar leikir í Badminton í Grønlandi. Tað var samstundis fyrstu ferð, at navnið Sigrun Smith gjørdist kent í føroyskum badminton, tí hon gjørdi ikki mætari enn at vinna gull.

– Tað var øgiliga stuttligt og ein góð uppliving at vera við í Grønlandi, og nú gleði eg meg til eisini at sleppa við til Álands. Vit hava høgar ambitiónir og venja hart og miðvíst, og tað er spennandi at vera ein partur av hesum, sigur Sigrun, tá vit hitta hana millum venjingarnar fyrr í vikuni.

– Hvussu tað verður við gullinum hesa ferð, tori eg ikki at siga so nógv um, hóast eg veit, at fleiri munnu vænta, at eg kann endurtaka sigurin. Men so skal eisini sigast, at onkrar av sterkastu oyggjunum ikki vóru við í Grønlandi, so helst er mótstøðan eitt sindur harðari hesa ferð. Men eg fari at gera mítt besta, og kanska fer at eydnast at endurtaka gullið.

### Óvon við kapping

Heima í Danmark spælir Sigrun Smith við einum liði, sum er í næstbestu deildini, men tá hon kappast í einstaklingakappingum, er hon við í meistaradeildini.

– Um nakrir av føroysku badmintonspælarunum kundu gjørt seg galdandi í donsku kappingini, er eitt sindur torført at siga, tí her eru fleiri avmarkingar. Tey somu spæla ímóti hvørjum øðrum alla tíðina, meðan vit niðri alla tíðina spæla ímóti ymsum mótstøðufólkum, sigur hon.

– Stórt sæð alt er øðrvísi niðri, so tí kundi tað kanska verið eitt sindur torført. Eg merki eisini á føroysku spælarunum, at teir kanska ikki eru so vanir við at kappast í størri hópi. Men tá havt verður í huga, at tey eru so fá, so haldi eg, at tey fáa sera nógv burturúr.

Nú farið verður til Álands, er Sigrun kortini við gott mót, tí hon heldur, at ein góð breidd er í hópinum. Hóast spælarar sum Niclas Eysturoy og Ragnar Rasmussen ikki eru við, tí teir eru skaddir, heldur hon eitt nú, at føroyska liðið er væl fyri á kvinnusíðuni.

– Vit gleða okkum øll til at sleppa til Álands, og so fáa vit at síggja, hvat kemur burturúr. Vit fara at royna okkara besta, sigur hon.

**Sigrun Smith vann gull á alternativu oyggjaleikunum í badminton, sum var í Grønlandi, tí badminton ikki var við á Rhodos fyri tveimum árum síðani. Nú skal hon royna at verja gulli á Álandi**

**Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir**

## FAKTA

**Hesi umboða Føroyar í badminton á Oyggjaleikum**

Sigrun Smith
Gurið Poulsen
Brynhild Carlsson
Rannvá Carlsson
Aksel Poulsen
Absalon Eysturoy
Røgvi Poulsen
Magnus Gaard
Bjartur Lamhauge